***Viðmerking til § 3, stk. 2**. Tíðarfestu virkisætlanirnar og ítøkiligu málini um minking av útlátinum, skulu gerast alsamt meiri framsøkin, hvørja ferð tey verða sett.*

er hendan:

Tíðarfestu virkisætlanirnar og ítøkiligu málini um minking av útlátinum skulu heilt víst verða framsøkin, men orðingin um, at málini "alsamt skulu gerast meira framsøkin" er í andsøgn við kap. 1.3, stk. 5. í viðmerkingunum, har tað stendur at "Flest øll munnu vera samd um, at ikki ber til at bíða til síðstu løtu at seta tiltøk í verk, sum flyta Føroyar burtur frá oljuni.".

Tað sum er umráðandi er, at greið ávegis mál, ella deilmál, verða sett, nevnilig fyri at sleppa undan at alt skal gerast í síðstu løtu.

***Viðmerking til § 5.** Skipað verður eitt óheft Veðurlagsráð við serfrøðingum, sum skal*

1) gera tilmæli til landsstýrisfólkið í veðurlagsmálum um val og vavi av átøkum, sum vera mett neyðug og hóskandi fyri at røkka bindandi veðurlagsmál Føroya,

er hendan:

Mest sannlíkt kemur ein týðandi partur av átøkunum, antin beinleiðis ella óbeinleiðis, at ávirka Sev og rakstur tess - sum kommunurnar eiga og tískil uttanfyri ræðisrættin hjá landinum.

Harumframt er serfrøðin á økinum til taks í Sev.

Eitt skikkað starvsfólk í umsitingini hjá Sev eigur at verða fastur limur í veðurlagsráðnum.

***Viðmerking til § 5, stk. 1. 3)** luttaka í almennum kjaki og varpa ljós á veðurlagsbroytingar.*

Stk. 2. Í Veðurlagsráðnum sita trý umboð við hollum førleikum innan veðurlagsøkið. Landsstýrisfólkið velur umboðini fyri fýra ár í senn eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya.

er hendan:

Sev tilnevnir eitt skikkað starvfólk hjá felagnum sum eitt teirra.

Viðmerkingar til 1.2 Galdandi lóggáva (uppískoyti í hesum brotinum undirstrikað og við feitum niðanfyri)

Í 2015 vann SEV norðurlendsku umhvørvisvirðisløninа fyri at seta framsøkið mál um, at ár 2030 skuldi øll elframleiðslan stava frá varandi orkukeldum og ikki úr olju. Eitt mál, sum hevur verið stýrandi fyri SEV og landsstýrið, men sum nú er linkað og seinkað, tí tíðarætlanin við pumpu- og goymsluskipan til vatnorku í Vestmanna, ikki heldur og fleiri vindorkuútbyggingar ***og***

sólorkuútbyggingar í síni heild *hava tikið longri tíð enn ætlað. Afturat hesum kann staðfestast, at orkuskiftið á landi gongur heldur striltið.*

Viðmerking til brotið:

Eisini hava landsstýrið og SEV í felag lagt eina fimm ára útbyggingarætlan fyri elframleiðslu úr varandi orkukeldum. At fremja hesa ætlan er grundleggjandi fortreyt fyri at gera tað møguligt at fremja eitt grønt orkuskifti á landi komandi árini.

er hendan:

Hóast fleiri ætlanir eru gjørdar, so er tað eitt fakta, at tað er trupult at fáa sett vindorku upp. Hetta eigur at verða addresera í hesi ella aðrari lóg, so tað gerst meira smidligt at seta vindorku upp.

Viðmerking til 1.3 Endamálið við uppskotinum, brotið:

Hetta verður eitt nú gjørt við at skipa eitt Veðurlagsráð við serfrøðingum, sum fær tilmælandi uppgávur til politisku skipanina. Eitt Veðurlagsráð er ikki eitt fyrisitingarligt stjórnarráð, men er samansett við serfrøðingum innan veðurlagsøki, hvørs uppgávur verða at greina, leiðbeina og gera tilmæli um veðurlagspolitisk átøk og at varpa ljós á og luttaka í almennum orðaskifti um veðurlagsbroytingar.

er hendan:

Sama viðmerking sum omanfyri.

Viðmerking til 2.1 Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur, brotið:

Ikki ber til at meta um fíggjarligu útreiðslurnar, sum framtíðar veðurlagsátøk fara at hava við sær fyri land og kommunur fyrr enn átøkini verða ítøkiliggjørd í framtíðar virkisætlanum um minking í útlátinum av vakstrarhúsgassi.

Er hendan:

Eyðsæð er, at eitt orkuskifti á landi fer at hava stórar fíggjarligar avleiðingar fyri Sev.

Tí er umráðandi, at Sev er við í tí partinum sum hevur við orkuframleiðslu, veitingartrygd, útbyggjan av elnetinum og útbygging av skipanarberandi tænastum, so elskipanin í síni heild, sum ein samfelagskrittisk eind, verður rikin á ein skynsaman hátt og spælir konstruktivt við í skiftinum.

Viðmerking til brotið:

Heldur ikki ber til at greiða frá, hvørjar fíggjarligar avleiðingar komandi virkisætlanir um at minka útlátið av vakstrarhúsgassi fara at hava fyri fyri fyritøkur, einstaklingar, ávísar samfelagsbólkar og onnur.

er hendan:

Øll komandi burðardygg orkuumlegging verður umgjørd til elloysnir, og á hendan hátt gerst el og fyri ein stóran part føroyska elskipanin krummtappurin í komandi orkurenslinum í samfelagi okkara.

Viðmerking til 2.17 Talvan: Yvilit yvir avleiðingar av lógaruppskotinum, Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar fyri kommunalar myndugleikar = Nei. Sama viðmerking sum omanfyri.

Viðmerkingar til Kapittul 3. Serligar viðmerkingar Til § 1 (uppískoyti í hesum brotinum undirstrikað og við feitum niðanfyri)

*Tað, at lógin ásetur bindandi veðurlagsmál fyri Føroyar, merkir at vit skulu hugsa **og** taka globala samábyrgd og handla lokalt. Vit skulu stutt sagt:*

og brotið:

*Veðurlagsfløttar eru vorðin ein veruleiki. Í nógvum londum ávirka veðurlagsbroytingar lívfrøðiliga margfeldið so nógv, at fólk í hesum londum hava mist sítt tilverugrundarlag. Bæði vatntrot, **ódnarveður** og vatnflóð hava oyðileggjandi avleiðingar fyri lond, fólk og djóra- og plantulív runt um í heimi.*

Viðmerking til Til § 4, brotið:

Allir geirar í samfelagnum fara at verða ávirkaðir av veðurlagspolitiskum átøkum. Fyri at fyribyrgja andsagnir og óætlaðar avleiðingar av førda orku- og veðurlagspolitikkinum, er umráðandi at landsstýrisfólkið ráðførir seg við allar týðandi partar, hvørja ferð ein nýggj fimm ára ætlan verður gjørd ella dagførd. Ráðførsla innanhýsis í landsstýrinum er eins týðandi, sum ráðførsla við kommunurnar. Serliga umráðandi er, at førdi fíggjarpolitikkurin stuðlar undir førda orku- og veðurlagspolitikkin. Eisini er umráðandi at kommunurnar og SEV eru við til at gera orku- og veðurlagspolitisk átøk til veruleika í tann mun tað liggur á teimum at fremja átøk til fasta tíð.

er hendan:

Sev noterar sær, at her verður staðfest, at kommunurnar og Sev eru við til at gera orku- og veðurpolitisk átøk til veruleika.

Viðmerking til Til § 5, brotið:

Serfrøðingarnir verða tilnevndir av landsstýrisfólkinum í veðurlagsmálum eftir tilmæli frá Fróðskaparsetur Føroya.

Er hendan:

Sev meinar, at tann eini limurin skal tilnevnast av Sev